16. mars 2010

Tíðindaskriv frá Ein tími um árið

# Heili 97.448,00 krónur eru innkomnar

Verkætlanin Ein tími um árið er ein hjálparfelagsskapur, ið byrjaði í Føroyum í juni 2009. Hugskotið aftanfyri er, at Ein tími um árið savnar inn tímalønir og letur hesar til ein viðurkendan hjálparfelagsskap. Hvørt ár velur Ein tími um árið ein nýggjan hjálparfelagsskap og virkar sostatt sum undirleverandør til hjálparfelagsskapir.

**Stuðulin í ár**
Allur stuðulin sum kemur inn í 2010 verður brúktur til beinleiðis hjálp. Tvs. einki verður brúkt til umsiting. Hvørki umsiting av Ein tími um árið, ei heldur til umsiting av teimum felagsskapum vit stuðla.

**Heili 97.448,00 kr. eru innkomnar**
Í februar 2010 er fyrstu ferð vit hava savnað pening inn og vit eru sera fegin um at nógvir føroyingar hava donera tímaløn. Vit vilja nýta høvið til at takka øllum, sum hava víst verkætlanini álit við at donera eina tímaløn. Túsund, túsund takk fyri tað.

**Hvat verða tímalønirnar brúktar til í ár**
Í 2010 hava vit valt at stuðla einari ommu og hennara 7 ommubørnum í Kambodia, við m.a. nýggjum húsum og mati og skúlagongd til børnini í upp til 2 ár. Harumframt hava vit valt at stuðla 6 foreldraleysum børnum í Liberia.

- kr. 40.000
  fara til Kirkjuliga Heimamissiónina, sum stuðul til ommuna og hennara 7 ommubørn í Kambodia
- kr. 57.448,00
  fara til ABC barnahjálp, sum stuðul til 6 foreldraleys børn í Liberia

Koma fleiri tímalønir inn á kontoina hjá Ein tími um árið í 2010, verða hesar fluttar til ABC barnahjálp, sum stuðul til verkætlan teirra í Liberia.

**Omman og 7 ommubørnini í Kambodia**
Hjálpin til ommuna og ommubørnini í Kambodia, verður veitt gjøgnum Kirkjuliga Heimamissiónina í Føroyum. Kirkjuliga Heimamissiónin stuðlar einari kirkju í Kambodia, m.a. við at hava starvsfólk á staðnum. Í løtuni er tað føroyingurin Reimund Langgaard. Hann kemur, saman við starvsfólkum á staðnum, at syrgja fyri at omman fær nýtt hús, mat og skúlagongd til børnini.

**6 foreldraleys í Liberia**
Hjálpin til tey 6 foreldraleysu børnini í Liberia, verður veitt gjøgnum ABC barnahjálp í Føroyum. ABC barnahjálp í Føroyum, hevur saman við ABC barnahjálp í Íslandi sett á stovn ein skúla og skúlaheim í Liberia. Tey 6 foreldraleysu børnini búgva á skúlaheiminum og kunnu við hjálp frá pengunum frá Ein tími um árið, nú trygt búgva á heiminum í meiri enn 2 ár. Her fáa tey mat, skúlagongd og læknahjálp.

Revisor hjá Ein tími um árið er Sunniva Bjarnastein, Inpact.

Les meiri um Ein tími um árið á www.eintimi.com.

Vinarliga
Ein tími um árið
v/Ásu Andreasen